# Skemt 03 og Óli P í Tinganesi



Anfinnur Kallsberg, løgmaður fær vitjan av teknaranum Óla P



Millum Tinghúsið og Tinganesi varð eisini stokkið inn á gólvið á Gamla Apoteki, har formaður Javnaðarfloksins og fyrrv. landsstýrismaðurin Jóannes Eidesgaard fekk nýggju bókina

BÓKAÚTGÁVA

Nakrir av teimum, sum hava verið oftast at síggja á baksíðuni í Sosialinum hesi seinastu 15 árini Óli P hevur teknað á baksíðuni í Sosialinum munnu vera Anfinnur Kallsberg, løgmaður, Edmund Joensen, tingformaður og Jóannes Eidesgaard, fyrrverandi landsstýrismaður. Siður hevur verið øll árini at lata løgmanni og tingformanninum nýggjastu Skemtbókina í jólagávu. Hesaferð - nú talan er um eina jubileumsbók fyri øll árini, endaði eisini ein bók inni á Gamla Apoteki, hjá formanninum í einum av andstøðuflokkunum.

Teknarin vitjaði sjálvur í Tinganesi, í tinghúsinum og á Gamla Apoteki í vikuni og handaði Anfinni Kallsberg, løgmanni og Edmundi Joensen, tingformanni og formanninum í Javnaðarflokkinumeintak av jubileumsbókini. Skemt 2003 er nevniliga ikki bara ein vanlig bók í røðini av Skemtútgávum. Hon er nakað serligt, tí fyrstu ferð í hesi bókaútgávusøgu eru litir lagdir á tekningarnar. Tvs. ein part av teimum. Trý fólk hava valt út »15 tær bestu« og síðani eru tær allar litlagdar. Hetta er gjørt fyri, at fólk eisini skulu síggja, at møguleiki er at ogna sær tekningarnar í liti. Í nýggjastu Skemtbókini eru umleið 170 tekningar. Við hesi bókini eru umleið 2500 tekningar givnar út í bók. Skemt 2004 er longu við at taka skap. Fyrstu tekningarnar eru longu farnar av bakkastokki og eru at síggja í Sosialinum hvønn týsdag, hósdag og leygardag.



Óli P handar Edmundi Joensen, tingformanni jubileumsbókina Skemt 03

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæra mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Petronella Christine Lamhauge**
Toftir

andaðist týsdagin 9. desember á Landssjúkrahúsinum, 87 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Fríðrikskirkjuni leygardagin 13. desember kl. 13.00.

*Vegna familjuna*

**Jóhanna, Nicolina, Louisa og Sámal**

*Tey, ið vilja minnast Nellu, kunnu lata lata eina peningagávu til Fríðrikskirkjuna.*

## Rættingar til Skemt

Tíverri er okkurt komið skeivt fyri í nýggjastu Skemtbókini og vit biðja fólk, sum vilja ogna sær bókina halda okkum til góðar. Men gjørt er gjørt. Tað vendist ikki aftur. Tó ber til hjá fólki sjálvi at taka við hesar rættingar ella manglar.

Síða 8. Her er av misgávum komin skeiv tekning.

Síða 111 og 112. Tekstirnir eru umbýttir.

Littekningarnar fyri árini 1989, 1990 og 1991 mangla replikkirnar, sum eru hesar:
1989 (Síða 134)
-Tað skal eingin fortelja mær, at tað er Heilsuskaðiligt at eta grind og spik!

1990 (Síða 135)
-Klárur Ivan - nú taka vit frakkan frá honum!

1991 (Síða 136)
-Nú skulu okur spela Dam!

Klippið hetta út og leggið í bókina.

**Blaðstj.**



# Umhugsi við piprandi hjarta

**Tjóðveldisflokkurin í Suðurstreymoy ætlar at fáa Herman Oskarsson at stilla upp fyri flokkin. Herman Oskarsson var ikki á fundi, men sigur ikki nei beinanvegin**

UPPSTILLING
*Øssur Winthereig*
*ossur@sosialurin.fo*

Millum tey umleið 30 nøvnini, sum vóru nevnd á uppstillingarfundi hjá Tjóðveldisflokkinum í Havn, var formaðurin í Búskaparráðnum og stjórin á Hagstovuni, Herman Oskarsson.

– Eg siti enn við piprandi hjarta og hugsi um tað sum hendi á fundinum hjá Tjóðveldisflokkinum, sigur Herman Oskarsson.

Hann var ikki á fundinum og er ikki limur í Tjóðveldisflokkinum, men vil kortini ikki avvísa, at hann ætlar at hugsa um støðuna nakrar dagar afturat.

– Soleiðis byrjar tað. Man verður skotin upp og so skal man hugsa seg um, og tað má eg so eisini gera, sigur Herman Oskarsson.

### Óheftur stovnur

Nú er hann so nevndur í samband við Tjóðveldisflokkin og sigur ikki nei beinanvegin. Hevur hann ikki longu tá valt síðu í føroyskum politikki.

– Hetta er ein púra ókend kombinasjón fyri meg. Eg eri formaður í Búskaparráðnum og stjóri á Hagstovuni. Ber tað yvirhøvur til fyri meg at fara upp í partapolitikk, spyr Herman Oskarsson. Hann hevur áður verið við á vinstraveinginium í Føroyum og í stríðnum móti EEC, sum ES æt fyri 30 árum síðani.

– Hagstovan skal vera ein púra uttanveltaður stovnur, so hjarta hjá mær heldur ikki uppat at pipra, tá eg hugsi um, hvat er hent.

– Hetta er púra gagggagg fyri meg, sigur Herman Oskarsson, sum kortini tekur tilboðið í álvar og umhugsar støðuna.



Formaðurin í Búskaparráðnum og stjórin á Hagstovuni, Herman Oskarsson, er biðin um at stilla upp fyri Tjóðveldisflokkin

# Jákup Sverri bíðar til næstu ferð




Jákup Sverri Kass hevur umboðað Sjálvsstýrisflokkin á tingi, men verður ikki á listanum hesiferð

**Sjálvstýrisflokkurin má klára seg uttan Jákup Sverra Kass hetta løgtingsvalið, sum vil gera útbúgvingina lidna**

UPPSTILLING
*Øssur Winthereig*
*ossur@sosialurin.fo*

– Tað verður ikki eg, sum bjargi Sjálvstýrisflokkin hesiferð, men eg havi lovað at hjálpa í valstríðnum, meðan eg eri heima í jólafrí.

Tað er Jákup Sverri Kass, sum hevur umboðað Sjálvstýrisflokkin í løgtinginum, sum greitt sigur, at hann ikki stillar upp til løgtingsvalið hesiferð.

Jákup Sverri Kass er í lestrarørindum í Århus, har hann lesur enskt og evropeisk viðurskifti. Hann hevur verið í Århus í hálvt triðja ár og gongur eftir ætlan, so er Jákup Sverri Kass klárur aftur um trý ár.

– Eg eri sjálvstýrismaður enn, men eg segði longu í 2001, at eg komi ikki heimaftur fyrr enn útbúgvingin er liðug, sigur Jákup Sverri Kass.

Hann dugur at síggja, at løgtingsvaldið hesifer kann vera avgerandi fyri flokkin, men vísir á, at fleiri ferðir áður hava kanningar spátt, at flokkurin fánar burtur.


